# FAS skipan eigur

**Í døgunum 9-12. september var stýrið fyri ALS á eini kunningarferð í Álandi. Her fekk stýrið eina góða kunning um álendska samfelagið, arbeiðsmarknaðin og arbeiðsloysisskipan. Í tveimum greinum verður greitt frá tí, sum fekst burturúr ferðini**



Her hittast fýra stórar fergur í havnini í Mariehar
í upprunalíki. Henda fýramastraða barkin er ímyr

FERÐAFRÁSØGN
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Tað var so heppið fyri føroyska ferðalagið, at tað var ein føroyingur í Álandi, sum legði vitjanina til rættis, og sum var við á vitjanini. Hetta er Maiken Poulsen, ættað av Strondum, sum í mong ár hevur arbeitt fyri skiftandi løgmenn, heilt síðan 1983.

Maiken kennir væl Áland. Hon hevði eisini eina tíð í 1994 skiftisstarv í Álandi. Hon er fyri nøkrum fáum árum síðani blivin gift við einum álendingi og býr í Álandi.

Skráin var eisini sera áhugaverd. Fyrra dagin á vitjanini høvdu hesi framløgur fyrrapartin:
Daniel Dahlén frá Ålands Handelskammer,
Linnéa Johansson frá Landskapsregeringens næringsafdeling
Johnny Mattson frá arbeiðsgevarafelagnum
Olof Karlsson frá fiskavirkisfelagnum, fyrrverandi fiskivinnustjóri
Fredrik Lundberg fyri fiskiveiðufelagið
Hendrik Lagerberg fyri fakfeløgini

Seinnapartin var vitjað á einum laksa- og fiskavirki. Síðan var vitjað á Crosskey Bank, og aftaná tað á Arbeiðsloysiskipanini.

Seinna dagin vóru vitjanir millum annað á einum búskaparligum kanningarstovni, har álendski føroyaserfrøðingurin Agneta Karlsson hevði framløgu.

## Bygdamenning í verki

Vit hava øll hoyrt um Áland, men tað er ikki vist, at øll vita so nógv um hendan oyggjabólkin, sum liggur nøkulunda mitt millum Svøríki og Finland. Tað eru bert fáir tímar við ferju til bæði grannalondini. Tað er so stutt úr Svøríki, at meginparturin av elektriska streyminum kemur haðani.

Í Álandi er ikki so høgt sum hjá okkum. Hægsta punkt 129 metur. Men hinvegin hava tey nógv fleiri oyggjar, hólmar og sker, ikki færri enn 6.757 í tali, og tað búgva fólk á umleið 60 av teimum. Nógvar teirra eru samanbundnar við brúm og byrgingum.

Tað er áhugavert, at fólkatalið á teimum smærru oyggjunum hevur hildið stand seinastu árini. Veruliga er fólkatalið á bygd økt meira enn í høvuðsstaðnum síðan 1980. Í Álandi verður nevniliga førdur ein veruligur útjaðarapolitikkur, millum annað við at elva fólkinum til at stovna sínar egnu fyritøkur í egnum heimbygdum. Hetta hevur eisini givið góð úrslit. 4,5% av øllum arbeiðsplássum eru í skergarðinum, og tað er ikki heilt galið og nógv meira enn hjá okkum.

Tað er gott ferjusamband oyggjarnar uttan fast samband, og tað er eisini ókeypis at sigla við strandferðsluni. Tað verður bert goldið fyri bilar, og hetta stuðlar eisini huginum at støðast. Í 2006 ferðaðust 1 mill. ferðafólk og ein hálv millión bilar á hesum rutum. Tað verða eisini brúktar meira enn 100 mill. kr. árliga til hesa tænastu.

Sjálvt í skergarðinum er fólkatalið nærum óbroytt síðan 1970.

Samlaða víddin á Álandi er 1527 ferkilometrar, sum er nakað tað sama sum Føroyar.

Miðalhitin er 6 hitastig fyri árið. Hann er frá -3 stig í januar til + 17 stig í august.

## Vildu ikki hava sjálvstýri

Samlaða íbúgvaratal er um 27.000, sum er munandi lægri enn hjá okkum. Ein stórur partur býr í høvuðsstaðnum Mariehamn, har fólkatalið er 11.000. Tað eru 16 kommunur. Tann minsta, Sottunga, hevur 130 fólk. Her hevur fólkatalið verið næstan óbroytt síðan



Kort av Álandi. Her eru meira enn 6.000 oyggjar. Fólk býr á 65 teirra

1980. Á bygd búgva 13.000 fólk og í skergarðinum umframt um 2.000 fólk. Hetta lutfall ikki broytt stórvegis seinastu árini. Hetta merkir, at eini 8% búgva í tí, sum vit kalla útjaðari, har tað í Føroyum neyvan er 1%. Her hevði kanska verið nakað hjá føroyingum at læra, um tað ikki er ov seint!

Áland hevur ein áhugaverda søgu. Tær vóru upprunaliga svenskar, men gjørdust í 1634 ein partur av Finlandi. Tí kom Áland í 1809 saman við Finlandi undir Rusland.

Tá ið russiska zardømið fall í 1917, var ein fundur millum allar kommunur í Álandi. Tá var samtykt at krevja sameining við Svøríki. Sama ár gjørdist Finland leyst av Ruslandi og Áland fylgdi við.

Við eini fólkaatkvøðu í 1919 ynsktu 95% av fólkinum at gerast ein partur av Svøríki. Men hesum ynski hevði finska stjórnin ikki hug til at eftirlíka. Hon vildi kortini geva teimum nakað av sjálvstýri. Ein sjálvstýrislóg varð samtykt av finska ríkisdegnum í 1920, men hon var havnað av álendingum.

Málið varð lagt fyri Nationernes Forbund, sum kom undan ST. Her varð gjørd ein neyðsemja, har allir partar fingu nakað. Svøríki hevði nú heldur ikki tann stóra áhugan fyri at fáa eitt stríð um Áland. Skipanin gjørdist, at Áland kom framvegis at hoyra til Finland, men Finland mátti plikta seg til at varðveita svenska málið og mentanina hjá Álandi.

Hetta var gjørt sum ískoyti til sjálvstýrislógina frá 1920. Gjørd varð ein avtala millum Svøríki og Finland um, hvussu hesar treytir skuldu umsitast. Eisini skuldi Áland vera uttanveltað og vápnaleyst. Hetta merkir framvegis, at herskip skulu halda seg uttanfyri álendskar havnir. Áland fekk eisini sítt egna ting, løgting eins hjá okkum, og fyrsta løgtingsval var í 1922. Nývalda løgtingið kom saman fyrstu ferð 9. juni sama ár, og verður hesin dagur roknaður sum sjálvstýrisdagur Álands. Seinni er sjálvstýrisskipanin endurskoðað fleiri ferðir. Áland kom saman við Føroyar í Norðurlandaráðið í 1970.

Áland fekk egið flagg í 1954 og egin frímerki í 1984. Teir láta væl at sølunu til frímerkjasavnarar.

## Fleiri og fleiri født uttanfyri Áland

Bert 70% av fólkinum eru fødd í Álandi, og hetta talið er í minking, 20% eru fødd í Finlandi og 6% í Svøríki. Orsøkin er ein gjøgnumtrekkur vestureftir, álendingar flyta til Svøríkis, meðan finnlendingar flyta til Álands. Men henda blandaða samansetingin er eisini eitt úrslit av, at tað verður gjørt eitt stórt arbeiði fyri at fáa